# Til starvsøkið hjá børnum og ungum við skerdum førleikum, verður søkt eftir tveimum leiðarum

**Vilt tú verða við til at taka ábyrgd og standa á odda fyri hesum starvsøki, eru tvey avbjóðandi størv leys at søkja**

**Sum stjóri á Sernámsdeplinum ella skúlastjóri á Skúlanum á Trøðni ert tú við til at menna og endurskoða økið**

**Um størvini:**
**Stjórarnir, ið verða settir, skulu saman við starvsfólkunum á stovnunum, Mentamálaráðnum og øðrum myndugleikum leggja til rættis og skipa sernámsfrøðiliga økið.**

## Stjóri til Sernámsdepilin

Endamálið við Sernámsdeplinum er at skipa fyri og ráðgeva í øllum sernámfrøðiligum spurningum, at gera kanningar og veita undirvísing, venjing, viðgerð, stuðul og vegleiðing, soleiðis at børn og vaksin eftir førimuni fáa høvi at mennast á øllum økjum, og at virka fyri hollari útbúgving og eftirútbúgving til teirra, ið starvast á sernámfrøðiliga økinum.

**Søkt verður eftir stjóra:**
- At hava fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum
- at hava námsfrøðiligu og fakligu leiðsluna av virkseminum á stovninum
- at skipa sernámsfrøðiliga virksemið kring landið
- at standa á odda fyri at menna stovnin og sernámsfrøðiliga økið
- at skapa virðing fyri stovninum, fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum starvsfólk á stovninum, fólkaskúlanum og serskúlanum
- sum er framsøkin og hevur framtíðarhugsanir innan sernámsfrøðiliga økið
- at menna námsligu tænastuveitingina í sernámsfrøðiligu skipanini í mun til núverandi fakliga tænastustøðið
- at ráðgeva Mentamálaráðnum, skúlum og øðrum um sernámsfrøðiligt virksemi
- at hava ábyrgdina av fakligari menning og eftirútbúgving av starvsfólkum í sernámsfrøðiliga virkseminum í undirvísingarverkinum
- sum saman við Mentamálaráðnum skal vera við til at gera reglur um virksemið á sernámsfrøðiliga økinum.
- sum er før/førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava kandidatútbúgving, umframt leiðslu- ella arbeiðsroyndir, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Harumframt vænta vit, at umsøkjari hevur:**
- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við nógvum ymiskum uppgávum í tøttum samstavi við Skúlan á Trøðni.Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett frá 1. januar 2011 ella so skjótt sum tilber. Setanarøkið er Mentamálaráðið og stovnar undir tí, og eigur tann, ið settur verður, at tola broytingar í starvinum og í starvsuppgávunum.

Starvið verður lønt í 37. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins, uttan tó at vera tænastumannastarv. Harumframt verður goldið 15 % í eftirløn.

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvi, c.v. og viðkomandi skjølum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **15. desember 2010, kl. 16.00.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn, ella send teldubræv til mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 306500, á 306545 ella í teldubrævi til olaus@mmr.fo

## Skúlastjóri til Skúlan á Trøðni

Skúlin á Trøðni er serskúli, ið skal undirvísa næmingum, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum.
Málið hjá Skúlanum á Trøðni er at menna einstaka næmingin persónliga, sosialt og fakliga. Málið er at gera næmingarnar so sjálvstøðugar og sjálvbjargnar sum gjørligt og betra teirra samskiftið við onnur, soleiðis at teir kunnu virka í samfelagnum bæði í skúlanum og uttan fyri skúlagátt.
Skúlin á Trøðni er serskúli, sum er skipaður sambært Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005.
Stjórin skal í samráð við Sernámsdepilin leiða og skipa arbeiðið á skúlanum.

**Søkt verður eftir skúlastjóra:**
- At hava námsfrøðiligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu leiðsluna av virksemi skúlans
- at standa á odda fyri at menna skúlans virksemi og skúlatilboð til børn við serligum tørvi
- at fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum starvsfólkini og næmingar í skúlanum
- at skipa fyri førleikamenning til starvsfólkini í skúlanum

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving við viðkomandi eftirútbúgving, umframt leiðslu ella arbeiðsroyndir, sum eru viðkomandi fyri starvið ella aðra viðkomandi akademiska útbúgving..

**Harumframt vænta vit, at umsøkjari hevur:**
- góð leiðslu- og samstarvsevni umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum í tøttum samstarvi við Sernámsdepilin. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett frá 1. januar 2011 ella so skjótt tilber. Setanarøkið er Mentamálaráðið og stovnar undir tí, og eigur tann, ið settur verður, at tola broytingar í starvinum.
Starvið er sáttmálasett og verður lønt í lønarflokki 36.1 sambært sáttmála millum Fíggjarmála¬ráðið og Føroya Lærarafelag. .

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvi, c.v. og viðkomandi skjølum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **15. desember 2010, kl. 16.00**.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn, ella send teldubræv til mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 306500, á 306545 ella í teldubrævi til olaus@mmr.fo

Sernámsdepilin er stovnur undir Mentamálaráðnum við egnari rakstrarjáttan á fíggjarlógini. Sernámsdepilin hevur ábyrgdina av at samskipa sernámsfrøðiligt virksemi og veita ráðgeving til foreldur, stovnar og skúlar o. ø. sum varða av børnum og ungum. NSR er stytting fyri náms- og sálarfrøðiligu ráðgeving depilsins. NSR- tænaturnar eru skipaðar í Eysturoynni, Suðuroynni og í Tórshavn. Í Sernámsdeplinum starvast í løtuni 16 fólk og í NSR-tænastueindunum 17 fólk. Harumframt eru serráðgevarar í parttíðarstarvi í fólkaskúlunum. Nýgg heimasíða er í gerð.

Skúlin á Trøðni skipar undirvísingartilboð til børn og ung, ið ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum. Í skúlanum eru í løtuni 50 næmingar og 35 starvsfólk. Til skúlan hoyrir næmingaheim, har pláss er fyri 12 børnum. Sí meira á heimasíðu skúlans www.skulin.fo/sat